# Alternativir vinnumøguleikar í landbúnaðinum

Fyrilestur á Ráðstevnu 2. apríl 2011

**Rólvur Djurhuus, landbúnaðarráðgevi**
***Búnaðarstovan/The Agricultural Centre***
***Frammi í Dal 166***
***FO 410 Kollafjørður***
***Faroe Islands***

Vanlig fatan í Føroyum hevur verið, at landbúnaður er bara seyður og neyt og stórt sæð einki annað – og kanska eplir, men so ikki meira. Í hesum fyrilestrinum fara vit at lýsa hendan spurningin nærri, og vit fara at síggja, at landbúnaður er so nógv meira.

Hvør er tað, sum fæst við landbúnað? Jú tað eru tey, sum sita við jørðini. Í øðrum londum eigur bóndin garðin hjá sær – alt matrikulnummarið. Í Føroyum er hendan skipan galdandi fyri helvtina av jørðini. Hin helvtin er tað, vit kenna sum festijørð. Tað er politiskur vilji, at tað almenna skal eiga hendan partin av jørðini. Og hon er býtt upp í umleið 360 matrikulnummur, sum hvørt verður fest út til ein festara.

Festitreytir og rættindi koma vit ikki nærri inn á her, men endamálið við festiskipanini er, at festarin skal brúka matrikulnummarið so væl, sum hann kann á sama hátt, sum óðalsmaðurin í Føroyum og aðrastaðni brúkar sína jørð so væl, sum hann kann.

Festarin kann ikki selja jørð burturav festinum, sum óðalsmenn kunnu, men Búnaðarstovan vil, at hann brúkar øll síni evnir og sítt hugflog fyri at fáa sum best burturúr á sama hátt, sum hann hevði gjørt, um hann átti matrikulnummarið. Miðast má ímóti, at festarin hevur somikið av rásarúmi og møguleikum, at tann almenna jørðin, tvs helvtin av øllum Føroyum, ikki liggur deyð og órørd, men verður gagnnýtt á besta hátt. Tað er av týdningi, at festarin fær høvi til at troyta allar møguleikar, sum eru á festinum, tí inntøkumøguleikarnir í landbúnaðinum eru avmarkaðir.

Í verandi støðu eru tað bara nakrir fáir bøndur, sum liva av sínum garði, men okkara ynski er, at viðurskiftini verða løgd so væl til rættis, at fleiri kunnu liva av gørðunum. Vit á Búnaðarstovuni hugsa fordómsfrítt og eru av tí áskoðan, at hugtakið landbúnaður eigur at víðkast langt út um tað, sum vit eru von við.

Tað siðbundna brúkið av landbúnaðarjørðini hevur sum sagt verið seyður og neyt – og bara tað. Og eg havi varhuga av, at tað er ein misfatan millum fólk, at tað ber væl til at liva av seyðahaldi - at tað gevur eina nøktandi inntøku. Hetta er bara ikki so, tí eru bara heilt fáir bøndur, sum liva av seyðahaldinum einsamøllum, og næstan allir síggja seg tí noyddar at

hava annað lønandi arbeiði umframt. Hetta skulu teir sjálvandi hava loyvi til, tí øll hava rætt til eina nøktandi inntøku. Ætlanin við hesum fyrilestri er at vísa á nakrar alternativar inntøkumøguleikar, sum kunnu koma upp á tal – annað enn neyt og seyð.

Vit kunnu stutt býta virksemi á einum garði í tríggjar høvuðstættir:

- Framleiðsla og tilgerð av matvørum
- Framleiðsla av øðrum vørum
- Rekreativt virksemi

Her verða nakrir møguleikar lýstir:

## Eplir

Vit kunnu keypa bílig útlendsk eplir í handlunum, men hvør sigur, at okkara eplir skulu seljast líka bíliga. Hetta er vøra, sum er framleidd í Føroyum – stutt á marknaðin, einki CO2 útlát til flutning, og vit vita, at tey eru góð.

Matstovur mugu kunna ganga á odda. Útlendsk ferðafólk gløða við, um tey fáa at vita, at eplini, tey fáa á matstovuni, ikki eru føroysk.

Prísurin heldur tey ikki aftur. Danir, sviar og norðmenn gjalda í dýra dóma fyri tey fyrstu eplini, sum verða tikin upp í sínum landi. Vit vita dømi um, at tíggju tey fyrstu kiloini hjá einum bónda á Samsø í Danmark blivu seld fyri 1.000 krónur fyri kilo, t.v.s. 10.000 krónur fyri 10 kilo. Síðani lækkaði prísurin, men fór ongantíð niður um 60 krónur fyri kilo. Í Svøríki og Noregi er sama støðan viðv. fyrstu eplunum. Í Noregi er tað í Stavanger økinum, tey fyrstu koma.

Og hvat er tað, sum selir. Jú, tað er ein søga. Í Føroyum hava vit eina serstaka eplavelting – flagveltuna. Og lata vit søguna um flagveltuna fylgja við, kunnu matstovur og onnur saktans seta prísin hareftir.

Tað hava verið gjørdar royndir við eplum á Royndarstøðini hjá okkum í fleiri ár. Grundað á hesar royndirnar hevur Peder Haahr sett hetta roknistykkið upp fyri ein hektara

- 125 røð við 80 cm ímillum
- 41.666 eplir á kr. 0,072
- 3.000 seteplir á kr. 3,- = 9.000 krónur
- NPK 2.100 kg á kr. 2,80 = 5.900 krónur
- Flagskering, jørðarbeiðing 10.000 krónur
- Útreiðslur 24.900 krónur

Úrtøkan er sett til 9 fold, tvs. 3 $kg/m^2$

- 3 $kg/m^2$, 30.000 kg/Ha á kr. 7,50 225.000 krónur

Úrslitið pr. Hektar er sostatt:

| | |
|---|---|
| Inntøkur | 225.000 krónur |
| Útreiðslur | 24.900 krónur |
| Úrslit | 200.100 krónur |

Annars kunnu íslendingar vera okkum ein góð fyrimynd á hesum økinum. Teirra hugburður er heilt greiður. Teir keypa íslendskt, og spyrt tú teir hví, so gløða teir við og biðja teg siga sær, hví teir ikki skuldu gjørt tað.

Annars er tann hugburður um at vakna í fólki sum heild, at matur er ikki nakað, vit brúka orku og útlát uppá at flyta um hálva klótuna. Lat okkum fyrst og fremst eta tað, sum vit framleiða á staðnum ella nærhendis.

Hví ikki - umframt vanliga velting til sín sjálvs og at selja - bjóða skúlum og barnagørðum at gera eina veltu og taka pengar fyri tað?

## Røtur

Røtur vaksa væl í Føroyum, og føroyingar kenna røtur og eru vanir við at brúka tær í húsarhaldinum. Bæði mairøtur og kálrabirøtur.

Kostfrøðingar mæla okkum til at leggja okkum eftir at eta tað grova, tunga grønmeti. Har eru røtur besta dømi.

Vit flyta nógvar røtur inn, og tað skuldi einki verið til hindurs fyri, at handlarnir selja føroyskar røtur.

Spurningurin er so, hvør tekur stigið, bóndin ella handilin? Báðir hava møguleikan. Ein bóndi kann royna at fáa eina avtalu í lag við handlar um at selja ávísa nøgd av rótum frá heystinum og langt út á veturin, tí røtur eru lættar at goyma – myrkt og kalt.

Á sama hátt kann handilin gera avtalu við bóndan, men tað er tíverri ofta ómakaleysari at keypa sovorðnar vørur frá veitaranum í Danmark. Vøran kemur í somu bingju, sum aðrar vørur. Einki roks. - Her krevst ein hugburðsbroyting.

Vit hava roynt røtur á Royndarstøðini og máta úrtøku. Fáa vit 5 røtur pr. metur av rað, sum viga 500 gram hvør, gevur tað 3,25 kilo pr. m$^2$ um 60 cm. eru millum røðini. Handlarnir selja røtur fyri einar 20 krónur/kilo. Siga vit, at framleiðarin fær einar 15 krónur/kilo, gevur hetta einar 50 krónur/fermetur, sum er tað sama sum 500.000 krónur /Ha.

## Gularøtur

Vaksa væl, har moldin er góð. Eru meira krevjandi enn mai- og kálrabirøtur, og vit fara helst ikki at velta líka nógv av gularótum sum hinum rótunum, men um handlar og matstovur vísa góðan hugburð mótvegis føroyskari framleiðslu, kunnu vit selja tað, sum verður framleitt.

Eingin sigur, at súpan skal gerast við liðugt, smátt skornum gularótum úr einum blikki ella einum frystum pakka. Aftur hugburðsbroyting.

## Kál

Kál veksur eisini hjá okkum, har lívdin er góð og moldin hóskandi. Bæði kálhøvd og serliga blomkál. Við hesari framleiðslu er somuleiðis ein fyritreyt, at brúkarin ynskir at keypa føroyskt framleiddar vørur.

## Annað grønmeti

Annað smátt grønmeti sum t.d. persilla, radisur og grønleykur veksur sera væl í Føroyum.

## Rabarbur

Rabarbur vaksa heilt væl í Føroyum. Og tað eru eisini nøkur, sum hava stór stykkir við rabarbum at selja. Tað mátti verið so líka til, at matstovur brúka hesa vøru og reklamera við henni.

Fyri at siga tað einaferð enn: Tað hevur alt at siga, at vit hava tveir partar við. Tann, sum framleiðir øðrumegin, og tann, sum skal brúka vøruna hinumegin. Og teir mugu so ella so hava samband við hvønn annan.

## Hvannir

Frá fyrndartíð hava føroyingar brúkt hvonn. Tað verður lítið brúkt av tí nú, men eg ivist ikki í, at okkara góðu kokkar kunnu finna upp á okkurt forkunnugt serføroyskt við hvannum. So her er ein møguleiki, sum er verdur at troyta.

## Ber

Vit vita, at nøkur sløg av berum vaksa væl í Føroyum, so sum ribs, sólber og stikkulsber. Tað er bert ein spurningur um at finna góða lívd.

Hetta er ikki nakað fyri ein bónda hugsa fleiri, men tað er júst tað tað er, tí moldin verður umsitin av bóndum, og alt, sum veksur upp úr moldini, eru tað bóndur, sum skulu taka sær av.

Búnaðarstovan fer í næstum at vera við í royndum við hindberjum og jarðberjum í bíligum plasttunlum. Somu royndir vera eisini gjørdar í Noregi, Íslandi og Grønlandi. Og ber tað til í Grønlandi, so kunnu vit ikki vera verri.

Hetta eru vørur, sum skulu seljast og brúkast skjótt aftaná heysting, tí tær halda sær stutt á goymslu, so hesar vørurnar vera altíð betri enn innfluttar, tí vegurin til marknaðin er so stuttur. Hetta mátti verið eitt gott brand fyri okkara matstovur. Omaná: føroysk ber við føroyskari vaniljusós.

Gongur alt eftir ætlan, koma tey fyrstu berini næsta ár.

## Hønur

Innflutt egg eru bílig at keypa í Føroyum, og tí má tann, sum fer undir industriella framleiðslu av hønum í Føroyum, taka við, at hann kappast á sama marknaði við nógv størri fyritøkur har útreiðslurnar pr eind eru minni.

Tí haldi eg, tað vera rættast at umhugsa alternativar loysnir. Og onkur er, sum er farin undir eina bíligari loysn við leysgangandi hønum, sum eisini sleppa at ganga úti. Avgerandi spurningurin er, um brúkarin vil gjalda neyðugan prís fyri eggini.

Tað er heilt avgerandi, at brúkarin fær upplýst, at eggini eru frá hønum, sum ganga leysar úti, og ikki frá hønum, sum alt lívið eru innistongdar í einum lítlum kliva. Neyðugt er eisini, at framleiðslan livir upp til tey heilsufrøðiligu krøv, sum eru ásett. Tað er eisini ein avbjóðing at sleppa av við slaktið, tí vit hava ikki góðkent sláturhús.

## Gæs og dunnur

Hetta er nakað, vit hava havt í øldir, og sum fleiri fáast við.

## Grísar

Bíligar loysnir við fríttgangandi grísum. Her er aftur spurningur um brúkarin vil gjalda neyðuga prísin. Tað letur seg ikki gera at kappast við innflutt svínakjøt, sum er hópframleitt á

"grísafabrikkum". Ansast má sjálvandi eftir, at grísarnir sleppa inn undir tak í illveðri og kavaroki.

Tann, sum fer undir hetta, skal sjálvandi duga at røkta grísar, og hann má eisini duga at fletta grísarnar ella hava onkran sum dugir. Eisini má hann hava onkran, sum dugir at skera sundur og gera kjøtið til.Tí vit mugu minnast til, at føroyingar eru vanir við at keypa danskt grísakjøt, sum er tilgjørt á teirra hátt, so tann, sum ætlar at gera tað øðrvísi, má vissa seg um, at nakar vil keypa.

## Geitir

Geitahald hevur ikki verið vanligt í Føroyum, men tað kundi hugsast, at onkur lítil marknaður kundi verið.

## Sláturhús

Vit hava eina matvørulóg í Føroyum, sum í stuttum sigur, at kjøt at selja í handlum ella matstovum skal vera flett á góðkendum sláturvirki. Krøvini frá Heilsufrøðiligu eru hørð, og tað tykist, sum menn ikki halda seg sleppa víðari og bara bíða eftir, at onkur skal gera eitt stórt virki, sum loysir allar trupulleikar. Men tað sær út til at vera leingi at bíða.

Ein loysn, sum vit mæla til, er, at bóndur seta seg nágreiniliga inn í krøvini og vita, um tað er fíggjarliga ráðiligt, at teir sjálvir byggja sær góðkent virki, sum líkur øll krøv, og sum so eisini kann brúkast av øðrum í grannalagnum. Vit hava tvey dømir um slík virkir, eitt í Dímun og eitt í Hattarvík.

Teir mugu so gera eitt roknistykki fyri at gera sær greitt, hvat prísurin á kjøtinum og úrdráttunum skal vera.

## Runnar og trø

Í øðrum londum eru trævøkstir ein tíðandi landbúnaðarframleiðsla. Nógvir bóndur fáa at kalla alla sína inntøku burtur úr trøum.

Talan kann vera um stór trø, sum vera høgd í skógum og seld sagivirkjum at saga til timbur, men eisini um smærri trø at selja at seta niður í urtagarðar, og eisini t.d. jólatrø og greinar at pynta við, t.d til jóla og jarðarferðir.

Tað er sjálvandi ilt at siga, í hvønn mun trævøkstur kann gerast nøkur vinna í Føroyum, men hevur ein bóndi hug til at avtaka seyðin ella minka um talið fyri at gróðurseta trø í haganum ella pørtum av honum, so fer Búnaðarstovan ikki at seta seg ímóti tí.

## Garving av skinnum

Seyðaskinn eru ein av høvuðsvørunum, sum verða framleiddar á føroyskum gørðum. Tíverri gongst illa at fáa tey til høldar. Ein møguleiki, sum verður royndur onkustaðni í Føroyum, t.d. í Dímun, er at garva sjálvur. Hetta krevur sjálvandi at fólk duga hondverkið, og at tey klára at finna ein marknað fyri vøruni. Her er talan um eina nisjuframleiðslu, har nøkur skinn kunnu seljast við tí lokalu søguni afturvið. Prísurin verður at áseta hareftir.

Vit skulu læra okkum ikki at vera beskeðin og ikki so býttisliga fólkalig móti fremmandum ferðafólki, at vit ikki taka ivaleyst fyri. Vit fáa sjálvandi ikki selt øll skinnini í Føroyum á henda hátt. Tað almenna hevur annars latið studning fyri at fáa seyðaskinn til høldar, men hann er burturdottin, og vit vita einki, um hann kemur aftur.

## Lutir úr hornum og beinum, ull, klædnapløgg v.m.

Hetta er nakað, sum vit longu gera nakað burturúr. Hetta eru lutir, sum eru eftirspurdir av útlendskum ferðafólki. Og eisini her mugu vit duga at taka fyri, tí vit vita sjálvi, hvussu nógv vit keypa av tílíkum, tá vit eru uttanlands, og hvat tað kostar.

## Matsøla

Ein góður møguleiki at fáa burtur úr tí mati, sum verður framleiddur á staðnum, er at bjóða ferðafólki ein bita t.d. saman við øðrum upplivingum so sum gongutúrar, ríðitúrar, túrar við hagførum (ATVarum), túrar við báti, við á fjalli, við at ambæta og mjólka ella saman við einari frásøgn um søguna á staðnum ella um søgur og sagnir frá staðnum.

## Djóragarðar

Djóragarðar eru dømir um virksemi, sum krevja lendi. Vit hava ongar slíkar í Føroyum, men ítróttarfeløg hava gjørt djóragarðar á stevnum, og teir hava verið ómetaliga væl vitjaðir, so tað er ongin ivi um, at tørvur er á teimum. Ongin sigur, at vit skulu hava fremmand eksotisk djór. Tað ber til at byrja í smáum við lítlum kostnaði, og so víðka so líðandi.

Og t.d. bara hava vanlig føroysk djór. Helst hava sum mest uttandura, men annars ber til at innrætta gomul fjós og seyðhús. Til hetta virksemi krevst loyvi frá landsdjóralæknanum, og allarhelst skal hann hava eftirlit við virkseminum.

## Djóravist

Vit hava fingið nógv fleiri kelidjór í Føroyum, enn vit hava havt fyrr, samstundis sum fólk ferðast meira enn fyrr. Tað, at hýsa djórum, er ein upplagdur vinnumøguleiki hjá teimum, sum annars eru von við at fáast við djór, og vit hava bóndur, sum royna hetta. Her krevst eisini loyvi frá landsdjóralæknanum.

## Fisking og haruveiða

Síl í áum og harur eru tilfeingi, sum hoyra til jørðina. Hesi verða gagnnýtt nógvastaðni fyri gjald. Men eg haldi ikki, nakar hevur roynt at fáa útlendskar veiðumenn higar fyri tær heilt stóru upphæddirnar, sum vit kenna til aðrastaðni.

## Ríðing

Hetta er ein upplagdur møguleiki, sum longu verður troyttur av nógvum. Vit hava eitt serstakt føroyskt rossaslag, sum skuldi verið áhugavert fyri útlendsk ferðafólk.

## Hagfør

Vit hava dømir um, at onkur bjóðar ferðafólki at koyra í fjøllunum við hagførum (ATVarum). So kunnu vit kjakast um, hvørt hetta er gott ella ringt, men tað er so einki forboð móti hesum.

## Ferðafólk

Vit skulu royna at fáa hendur á teimum ferðafólkum, sum koma henda vegin. Tað ber til at skipa fyri longri gongutúrum at uppliva náttúruna og eisini stuttum mentunarligum túrum, har søgan um staðið verður fortald. Hetta seinna er helst áhugaverdast hjá føroyingum sjálvum. Til ber at bjóða ferðafólki við á fjall, í skorina, at fleyga, at fletta o.s.fr. Og taka pengar afturfyri.

## Undirvísing fyri skúlanæmingum

Børnini, sum vaksa upp í dag, eru nógv longri burtur frá landbúnaðinum og náttúruni sum heild, sammett við fyrr. Og hetta er líka nógv galdandi í Føroyum sum aðrastaðni.

Nógv børn fáa sína einastu vitan um djór gjøgnum sjónvarpið, t.d. frá onkrari amerikanskari sending um hundavenjingar í smáum íbúðum í stórbýum, og um hvussu hundar skulu klippast og vera ílætnir o.s.fr.

Hví ikki bjóða skúlum at koma við flokkunum heim á garðin og gera eina skipaða skrá saman við skúlanum til hvønn flokkin sær, so hon hóskar til hvønn aldursbólk. Landbúnaðarráðgevingin kann vegleiða í fakligum spurningum.

## Kamping

Tað er ein sannroynd, at tað kemur hópur av ferðafólki higar við tjaldi á rygginum ella á súklu ella í húsvogni. Einasta stað, sum vit kunnu bjóða teimum at kampa, er á kommunala plássinum Yviri við Strond í Havn.

Her eru vit eftirbátar við lít. Alla aðrastaðni, har vit ferðast, er stutt millum kampingplássini. Í Føroyum tykist støðan vera tann, at tey, sum hava møguleikarnar og umstøðurnar at byggja og reka kampingpláss, gera tað ikki. Her verður sipað til tey, sum sita við lendunum. Alla aðrastaðni eru tað bóndur, sum útvega lendi til kampingpláss, og oftast teir, sum reka tey eisini.

Hjá okkum hava vit lyndi til at bíða eftir kommunum ella landinum, men tey hava vanliga einki lendi tøkt, og rakstur av kampingplássi er vinnuvirksemi, og tað eiga sum kunnugt kommuna og landið ikki takast við. Uppgávan hjá kommununum í hesum sambandi er at taka sær av neyðugum loyvum so sum byggiloyvi og umhvørvisgóðkenning.

Fyri tey, sum fara undir hetta virksemi, er tað av týdningi at vera sjónligur. Tey mugu royna at koma við í teir faldarar og kunning annars, sum ferðafólk fáa.

## Golf

Hetta er ein møguleiki, sum verður nógv brúktur av bóndum í grannalondunum. Hetta kann gerast upp á fleiri mátar. Bóndin ella hansara partafelag kann standa fyri at gera vøllin og reka hann sum ein part av garðinum. Tað ber eisini til at leiga lendi til onnur at gera vøll og reka hann.

Í hesum døgum hevur tørvurin á golfvølli ella -vallum í Føroyum verið frammi alment í samband við Oyggjaleikirnar. Í hesum sambandi er vert at hava í huga, hvar vallir kunnu gerast og hvør ger teir. Tað er ikki rímiligt, at kommunur ella landið gera teir, tí rakstur av golfvallum er vinnuligt, og tað kunnu kommunur og landið ikki luttaka í, og haraftrat hava hvørki kommunur ella landið tøkt lendi, sum er egnað til golfvøll. So tað er eyðsýnt, at tey, sum sita við jørðini, eru høvuðsaktørurin.

Meginparturin av teimum víðu, veltu økjunum eru av góðum grundum ikki tøk til golfvøll, tí tey eru í brúki, og har liggja longu stórar íløgur, sum skulu forrentast, so hyggjast má eftir óveltum lendi, har tað er nóg slætt.

Tað er kostnaðarmikið at gera golfvøll. Tey, sum hava skil fyri tí, siga hálvonnur millión fyri hvørt hol, so tað skuldi blivið 27 milliónir fyri vøllin. Men hóast kostnaðin, vænti eg, at um

golfáhugaði og tey, sum sita við hóskandi lendi, seta seg saman, so hava vit góðkendar golfvallir um tíggju ár.

Eg havi her nevnt nakrar møguleikar. Men tað er ikki upp til nakran myndugleika at seta nakað av hesum í gongd.

Til tað hava vit brúk fyri eldsálum, sum síggja møguleikar, seta seg niður og gera neyðugar kanningar og fyrireiking, fáa fígging til vega og og so seta í gongd.

Uppgávan hjá myndugleikum er ikki annað enn at syrgja fyri, at ongar óneyðugar forðingar ella fótonglar liggja í vegin fyri tí, sum er nevnt her. Og so sjálvandi at alt fer lógliga fram.

Og til tykkum, sum fara í gongd. Minnist til, at marknaðurin fyri nógvum av hesum er lítil, so fari nú ikki øll og geri tað sama.

Rólvur Djurhuus

# The Agricultural Centre

Ministry of Fisheries and Agriculture
Frammi í Dali 166
Kollafjørður, Faroe Islands



## Hvat er landbúnaður?




..hetta..


..vera..





## Høvuðstættir á garðinum

- Framleiðsla og tilgerð av matvørum
- Framleiðsla av øðrum vørum
- Rekreativt virksemi




2007/07/12


Røtur, kál og annad




Ber




Grisar


Sláturhús


Runnar og trø


Ull, skinn, horn
og bein


Matsøla


Djóragarðar


Djóravist




Riðing


Ferðavinna


Skúlanæmingar


Kamping


Golf





## Golfvøllur í Vestmannaoyggjunum




Golf


Takk fyri